# Góður fiskiskapur



*Líðarbrøður er 35 tons og 3 mans eru við. Fiskiskapurin er góður í løtuni kring oyggjarnar*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Tað frættist um góðan fiskiskap kring oyggjarnar og eisini í Suðuroynni kemur nógv upp á land**

FISKISKAPUR
*Dagfinn Olsen*

Herfyri frættist um góðan fiskiskap norðanfyri. Á Eiði kom sera nógv upp á land, visti Svf at siga frá.

Í vikuni hevur eisini ligið væl fyri sunnanfyri. Beint fyri vikuskiftið kom Líðarbrøður úr Vági inn á Vág og avreiddi 115 sentnarar, harav tað mesta var góður og stórur toskur. Teir høvdu tá verið úti í 4 dagar.

Túrin frammanundan høvdu teir tað sama, men vóru bert úti í 3 dagar. Eisini aðrir bátar hava fingið heilt væl. Landað verður til Uppboðssøluna í Vági.

Líðarbrøður er 35 tons og 3 mans eru við. Ein sentnari er mát, nýtt sunnanfjørðs, og er tað sama sum 100 pund.



*Tað so gott út, tá Líðarbrøður herfyri avreiddi í Vági*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

# Stórur Bachfagnaður í Vági

**Tann 25. og 26. juli verður stórt tónleikatiltak í Vágs Kirkju og tað eru tónar eftir Bach, ið fara at ljóma. Danskir og føroyskir tónleikarar leika. Søren Johannsen skal leiða orkestur og solistar. Stuttligt er at merkja sær, at hesin maðurin stendur í metbók Guinness fyri at hava spælt allar urgukompositiónirnar hjá Bach út í eitt**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Vágs Kirkja verður karmur um tónleikafagna hósdagin og fríggjadagin. Spældur verður tónleikur eftir Bach*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Hósdagin og fríggjadagin verður stórt tónleikatiltak í Vágs kirkju. Tað er tónaskaldið Bach, ið stendur ovast á breddanum hesar dagarnar, har bæði danskir og føroyskir tónleikarar fara at leika og syngja.

Tað er Claus Telling, ið eigur hugskotið til Bachfagnaðin. Marianna og Claus Telling hava tikið stig til tiltakið. Tey starvast og búðleikast í Vági, hon sum prestur, hann sum urguleikari og tónleikalærari.

### Nógv á skránni

Til Bachfagnaðin fara at leika fleiri tónleikarar. Københavns Festival Kammerorkester og limir úr Føroya Symfoniorkestri leika undir leiðslu av Søren Johannsen. Solistar eru Frits Overgaard Jacobsen, violin, Karin Brattaberg, sopran, Sigmundur Olsen, bass, Søren Johannsen, urga og Claus Telling, klaver.

Claus Telling og Søren Johannsen hava samstarvað nógv í Keypmannahavn. Søren er eisini vanur at loysa av í Havnar Kirkju sum urguleikari og tað ger hann eisini nú. Claus Telling helt tí vera gott høvi nú at skipa fyri tiltakinum og sostatt eisini halda samstarvið viðlíka.

Um Søren Johannsen kann ein stuttlig søga festast við. Hann er nevniliga í metbók Guinness fyri at hava leikt allar urgukompositiónirnar hjá Bach út í eitt.

Hann hevur eisini havt urgukonsertir í Føroyum áður.

Claus Telling fegnast um, at tað er eydnast at fáa bæði danskar og føroyskar tónleikarar við og eisini lokalar kreftir, ið royna seg sum solistar. Ætlandi skuldi Ljómur taka lut við kórsangi, men kórið er í løtuni á Danmarkarferð.

Ókeypis er ikki at skipa fyri slíkum og tónleikararnir lata sjálvur sín part, men fáa so eisini eina uppliving. Og gestirnir fáa ferðina og nakrar dagar í Føroyum. Tað eru annars Suðuroyar Sparikassi og Vágs Kommuna, ið hava stuðlað tiltakinum peningaliga.

Eydnast tiltakið væl, so verður kanska talan um líknandi tónleikatiltak í framtíðini, so hetta gerst afturvendandi tiltak, ið tó kann broytast innihaldsliga.

Longu nú er greitt, at fleiri tiltøk verða í heyst. Ljómur skal syngja kantatu eftir Bach og okkurt annað verður væntandi eisini.

## Bachfagnaður í Vágs kirkju tann 25. og 26. juli 2002

**Hósdagur 25. juli**

16:00 Goldbergvariatiónirnar
20:00 Klaverkonsert í D-moll
Dupult aria fyri bas og sopran:
Wann Komst du meine heil. Úr kantatu
Wachet auf, ruft uns die stimme
Violinkonsert í A-moll

Fríggjadagur 26. juli

16:00 Urgukonsert:
Passagaclia í C-moll
Sei gegrüsset, Jesu Gütig
Fantasi og Fuga í G-moll
20:00 Klaverkonsert í D-dur
Dupult aria fyri sopran og bass:
Mein Freund ist Mein. Úr kantatu Wachet
auf, ruft uns die stimme
Klaverkonsert í G-moll

# Prinsessa Alexandra fekk aftur ein son

**Mánamorgunin gjørdist danska kongshúskið ein prins ríkari. Prinsessa Alexandra fekk enn ein son, og soleiðis er lítli prins Nikolai nú vorðin stóribeiggi**

KONGSHÚSIÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

Nýggi prinsurin var 52 cm langur, og vigaði 3486 gram. Hann sá, eins og lítli prins Nikolai, dagsins ljós á Ríkissjúkrahúsinum.

Við hesum tíðindum kunnu danir nú aftur draga andan lættliga. Nógv hevur verið at sæð og hoyrt um prinsessu Alexandru, og nógvar eru myndirnar, ið hava víst hennar støðugt vaksandi búk.

Áðrenn tíðindini bórust um, at prinsessan enn einaferð bar barn undir belti, høvdu danskir fjølmiðlar fleiri ferðir sett spurning við, nær Kongshúsið fór at fáa enn ein arving.

Gleðin var tí stór, tá tíðindini um vaksandi búkin hjá prinsessuni bórust, og gleðin er nú av tí størsta í Danska Kongaríkinum.

Nýggi familjulimurin ber heitið prinsur av Danmark, og stendur hann sum nummar fýra í arvarøðini eftir krúnprins Frederik, pápa sín prins Joachim og stórabeiggjan prins Nikolai.



*Tíðliga mánamorgunin gjørdist prinsessa Alexandra enn einaferð mamma at einum lítlum prinsi*




